Kirsten Brix vart Ph.D. ritgerð:

# Undangonguverk

**Fríggjadagin vardi Kirsten Brix Ph.D. ritgerð sína um Regin í Líð, skaldarnavn Rasmus Rasmussen. Verjan tók hálvanfjórða tíma, og alt gekk upp á stás. Skaldskapin hjá Regini í Líð kallar hon fyri undangonguverk**

RITGERÐ
*Heri á Rógvi*



Kirsten Brix vardi fríggjadagin sína Ph.D. ritgerð um Regin í Líð, skaldarnavn Rasmus Rasmussen.

Mynd: Jens Kristian Vang



Vararektarin, Hans Pauli Joensen, v.m, leiddi verjuna av ritgerðini hjá Kirsten Brix fríggjadagin

Mynd: Jens Kristian Vang

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein verja av einari Ph.D. rigerð er í Føroyum. Ein av hesum sjáldsomu stundum var fríggjadagin, tá Kirsten Brix vardi sína Ph.D. ritgerð. Ritgerðin er um skaldskap hjá Regin í Líð, sum var skaldarnavnið hjá Rasmus Rasmussen, Rasmus á Háskúlanum.

Ein tílík Ph. D. ritgerð er eitt trý ára verk, sum vanliga verður tikið við ein lærdan háskúla. Tann, ið skrivar eina tílíka Ph.D. er vanliga kanditatur ella magistari og velur síðani at fara undir hesa trý ára gongdini, sum kallast fyri Ph.D. Vanliga er Ph.D. at meta sum ein granskingar verkætlan, har arbeitt verður við einum evni, ið ikki áður er kannað í størri mun. t.e. nortið verður við óroynd evni. Talan er um eina doctor grad, sum verður síðustillað við dr.phil. og gevur rætt til at kalla seg fyri doctor.

Ì kunngerðini um Ph.D. lestur á Fróðskaparsetrið Føroya stendur at lesa:

Ph.D.-heitið verður latið sum viðurkenning av, at tann, ið fær heitið, nøktandi hevur avrikað granskaraútbúgving og við eini ritgerð, sum er vard alment, hevur skjalprógvað, at vera førur fyri at gjøgnumføra vísindaligar rannsóknir við sjálvstøðugt at nýta háttaløg í vísindagreinini og á tann hátt hevur latið eitt íkast til gransking á einum stigi, sum samsvarar við altjóða Ph.D.-støðið í vísindagreinini.

Kirsten Brix, sum vardi sína ritgerð fríggjadagin, er útbúgvin cand.mag í donskum og týskum, og hon hevur eisini listið á føroyskt á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, soleiðis at hon nú kann undirvísa í trimum ymsum málum.

Hennara ritgerð um Regin í Líð er skrivað á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, og hetta er tann fyrsta av sínum slag á Fróðskaparsetrinum. Framman-undan er Malan Marnersdóttir dr.phil í føroyskum bókmentum, og hon var eisini vegleiðari hjá Kirsten Brix.

### Opponentar

Fríggjadagin, tá Kirsten Brix vardi sína ritgerð, gekk alt upp á stás, og hon kann nú av røttum nýta sítt nýggja heiti. Sum sagt er talan um eitt trý ára langt arbeiði, sum inniber eitt størri verk. Hetta verkið vóru tað so nakrir opponentar ella andstøðingar, sum skuldu viðgera og gera viðmerkingar til. Andstøðingar eru allir útbúgvið fólk við serkunnleika innan økið. Teira hava havt rigerðina til ummælis í tríggjar mánaðir sum dómsnevnd, og tað eru teir, ið gera av, hvørt ritgerðin er á nóg høgum støði ella ei.

Tað var tó einki í vegin fyri, at Kirsten Brix fekk sína ritgerð góðkenda. Tað tók hálvanfjórða tíma at avgreiða verjuna, og hetta var ein hálvan tíma innanfyri markið, sum er fýra tímar fyri eina tílíka verju.

Í dómsnevndini og sum opponentar hava sitið Turið Sigurðardóttir, cand.mag á Fróðskaparsetri Føroya, Anne Kari Skarðhamar, fyristiamanuensis, dr.art við Høgskolan í Oslo og Martin Zerlang, lektari mag.art við Universitetið í Keypmannahavn.

Kirsten Brix sigur, at tað er lagt ógvuliga nógv arbeiði í ritgerðina. Hon hevur eisini part av tíðini verið á lærdum háskúlanum í Keypmannahavn fyri at læra meira um rákið og tíðarskeiðið, sum ger seg galdandi í sambandi við verkinum hjá Regin í Líð.

Høvuðsevnið í ritgerðini er fýra fagurbókmentaligir prosatekstir eftir Regin í Líð. Talan er um hina fyrstu føroysku skaldsøguna, Bábelstornið, stuttsøgurnar Minnisvarðin, Rakul og Eyðun. Allir tekstirnar eru útgivnir í tíðarskeiðini frá 1906 til 1909.

Fyri at geva eitt dømi um, hvussu nógv arbeiði lagt er í, so kunnu vit nevna, at Kirsten hevur umsett allar tekstirnar til danskt fyri betri at kunna savna sær upplýsingar í samstarvi við útlendskar serfrøðingar.

Hon kom tó á eina umseting av bókini, ið Rasmus Rasmussen sjálvur hevði skrivað. Har eru nakrir broytingar gjørdar, og hon metir hetta sum eina stórhending.

### Undangonguverk

Við loyvi frá høvundanum, fara vit at prenta okkurt brot úr innleiðandi framløguni, sum varð hildin fríggjadagin. Í viðgerini leggur hon dent á at lýsa tað tjóðskaparliga, sum Rasmus Rasmussen var ein av undangomonnunum til við háskálanum og skrivingini.

“Sum háskúlastovnari er Rasmus Rasmussen við til at skapa ein pall, har tjóðareyðkennið, tað føroyska málið, er miðdepilin. Sum rithøvundurin Regin í Líð skrivar hann ta fyrstu føroysku skaldsøguna. Innihaldsliga lýsir hon ævisøguna hjá tjóðskaparrørsluni fram til tað mundið, hann fór undir at skriva hana, formliga er hon eitt dømi um tað tekstaslagið, sum sambært Benedict Anderson samsvarar við tjóðina.

Í tekstum sínum lýsir Regin í Líð sum tann fyrsti í føroyskum bókmentum samfelagsviðurskifti, kenslur, seksualitet o.s.fr. í modernaðum prosuformi. Bæði bókmentaliga og málsliga eru tekstir hansara undangonguverk”, skrivar Kirsten Brix m.a. í sínari ritgerð.



Turið Sigurðardóttir, cand.mag á Fróðskaparsetri Føroya, Anne Kari Skarðhamar, fyristiamanuensis, dr.art við Høgskolan í Oslo sótu í dómsnevndini

Mynd: Jens Kristian Vang



# Fleiri smáskaðar



Hesin trailaravognurin koppaði um hálvgum ellivu tíðina mánakvøldið

**Rættiligt illveður herjaði oyggjarnar mánakvøldið. Dúgvan avlýsti túrarnar aftan á náttúrðatíð, og sum leið út á kvøldið øktist vindurin bara. Onkur helt, at tað mátti vera mált upp í móti 30 metrum um sekundi í hvirlunum**

VINDUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Um hálvgum ellivu tíðuna mánakvøldið koppaði ein trailaravognur á ein annan, orsakað av tí nógva vindinum. Hetta vóru trailaravognar hjá Elmar Zachariassen. Teir plaga at standa á sandinum tætt við politistøðina, og har var sera nógvur vindur mánakvøldið. Ein triðji trailaravognur stóð eisini har, og tekjan í tí vogninum fekk nakað av skaða.

Fólk komu skjótt á staðið og tað tók ikki langa tíð, so var tamarhald á støðuni.

Norðuri á Helnabrekku koppaði eitt seyðahús, og í Hvannasundi koppaði ein arbeiðsskúrur.

Uppi við Borðoyarvík í Klaksvík liggur nógv órudd og leyst timbur og rekst uttanfyri timburdeildina. Hetta var til miklan ampa mánakvøldið, og sløkkiliðið mátti so fáa tað alt surrað fast, tí alt tað leysa feyk í nógva vindinum í millum húsini har uppi.

Kári Kjelnæs, leiðari hjá Klaksvíkar Sløkkiliðið, fílist á, at tað liggur so nógv leyst uttanfyri har uppi, tí tað er ikki fyrstu ferð, at teir mugu festa alt møguligt uttan fyri timburdeildina.

– Eg veit væl, at tað er summar, og man kanska ikki væntar sovorðnan vind, men alt, sum liggur leyst úti, tá nógvur vindur er, er til miklan ampa fyri øll, sigur hann.

Meðan sløkkiliðið var úti mánakvøldið og royndi at hjálpa har tørvur var fyri tí, pippaði hjá teimum um, at eldur var í.

Eldur var komin í eini sethús við Stangarvegin. Húsini standa beint omanfyri eini onnur hús, sum eldur var í stutt framman undan Norðoyastevnu.

Eldurin var í kjallaranum. Maðurin lá og svav í erva, men hann vaknaði av øllum roykinum. Eldurin fekk ikki spreitt seg um alt húsið, tí hann var innilæstur, tíbetur. Tá sløkkiliðið kom á staðið var nógvur roykur, men teir fingu sløkt eldin eftir lítlari løtu. Húsini hava fingið nógvan roykskaða.

Hesin eldsbrunin var tann fimti hjá Klaksvíkar Sløkkiliðið innan fyri tær seinastu fýra ella fimm vikurnar. Tríggir hava verið í Klaksvík, ein á Viðareiði og ein í Hvannasundi.



Eitt seyðahús á Helnabrekku fór um koll í nógva vindinum



Í Hvannasundi var eisini fitt av vindi og koppaði hesin arbeiðsskúrurin



Mitt í øllum rokanum fekk sløkkiliðið fráboðan um eldsbruna í einum sethúsum á Stangarvegnum í Klaksvík

# Heitir gestir - lunkaðir vertir og kalt kaffi

**Soleiðis byrjaðu væluppløgdu vertirnir, Eyðun Klakstein og Fróði Løkságarð, nýggju undirhaldssendingina, Kafé Grugg, sum Studio Pegasus tekur sær av hvønn mánadag seinnapart í summarskránni hjá Útvarpi Føroya**

UNDIRHALD
*Solby A. Eliasen*



Studio Pegasus fer eisini at seta sín dám á summarskránna hjá Útvarpi Føroya

**Klaksvík:** – Vit fara leggja okkum eftir at hetta skal verða ein løtt undirhaldssending, sigur Eyðun Klakstein, annar av vertunum í sendingini.

Tað skal vera ferð á sendingini. Hon fer at innihalda nógvan tónleik saman við skjótum innsløgum. Eisini eru tvær kappingar á skránni. Onnur er SMS kappingin, sum var í Plan B sendingini hvørt fríggjakvøld í vetrarskránni.

– SMS kappingin er blivin eitt slag av sermerki fyri Studio Pegasus, halda vertirnir báðir, Eyðun og Fróði.

Hin kappingin gongur út upp á, at eitt kent solospæl verður spælt og so kunnu lurtararnir gita úr hvørjum sangi hetta solospæl er tikið úr.

Teir greiða frá, at tað verða tó ikki bert teir, sum koma at seta dám á sendingina.

– Tá hendan sendingin er í luftini, fara lurtararnir at hoyra tey, ið vanliga eru í sendingunum, úr Pegasus, umframt, at onkur nýggj rødd eisini verður við.

Tað fara heldur ikki at vera Fróði og Eyðun, sum verða vertir í sendingini hvørja ferð. Ætlanin er, at ein kvinnuligur vertur eisini skal verða í sendingini framyvir.

Eyðun sigur eisini, at hóast tey leggja seg eftir at sendingin skal minna um hina undirhaldssendingina seinnapartar, Barometrið, so ætla tey kortini, at Kafé Grugg skal verða eitt sindur øðrvísi.

– Vit fara at royna at hava nøkur orginal innsløg, har vit í byrjanini av sendingini kunnu vekja áhugan og forvitni hjá lurtaranum, sigur Eyðun, og leggur aftur at, at tað er ikki bara sum at siga tað.

– Tú skal tá, sum vertur, hugsa teg væl um, hvussu tú leggur út við at greiða lurtaranum frá tí, sum fer at henda í sendingini. Um tú ikki leggur innslagið fram, sum eitt hvørt forvitnisligt, so kann tað henda so skjótt, at eitt fínt og skemtiligt innslag bara fer aftur við borðinum, tí tú ikki megnaði at fanga lurtaran, heldur Eyðun og Fróði samtykkir.

Sum heitið á sendingini leggur upp til, so er her talan um eina kafé eisini. Her hava teir báðir hugsað sær, at tað kundi verið stuttligt at havt eina sending, har fólk so at siga detta inn á gólvið til prát við vertirnar um eitt hvørt.

Studio Pegasus, sum eisini hevði sín lut í vetrarskránni hjá Útvarpi Føroya, hevur fingið somu tíð til at senda við í summarskránni. Men sendingar sum Heimabeitið, Fólk og Frítíð hjá Gunnari Nolsøe og Plan B hjá Kára Sólstein og Fróða Løkságarð verða ikki at hoyra í summar, men tað verða aðrar sendingar á skránni í staðin.

HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumper CH. v/last
km. 120.000, árg. aug. 1998
v/mvg 130.000,-

Citroen Xsara 1,6i 5h
km. 30.000, árg. feb. 1998
107.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 90.000, árg. nov. 1999
145.000,-

Citroen Xantia 1,9TD 5h
km. 60.000, árg. feb. 1998
118.000,-

Citroen Xantia 1,8i 16V 5h
km. 63.000, árg. okt. 1996
112.000,-

Citroen ZX 1,9D stc.
km. 89.000, árg. mars 1996
86.000,-

Citroen Berlingo 1,9D 4h
km. 81.000, árg. sept. 1998
109.000,-

Mitsubishi Galant 2,0
km. 150.000, árg. juni 1992
37.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
v/mvg 70.000,-

Mitsubishi Pajero 2,8TDi
km. 82.000, árg. sept. 1997
v/mvg 177.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

Mazda Demio 1,3 5h
km. 50.000, árg. feb. 1999
99.000,-

Nissan Terrano 2,7TDi
km. 71.000, árg. nov. 1997
v/mvg 133.000,-

Hyundai Accent 1,3LS
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Kia Sportage 4x4 2,0TD
km. 49.000, árg. aug. 1997
87.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820